# Kjak



Jógvan Arge

## Tann kommunala ólavsøkukonsertin

Ósannindini hava ikki fingið ov lítið í orðadráttinum um Ólavsøkukonsertina, og í grein í Dimmalætting týskvøldið við heitinum "Sannleikin um ólavsøkukonsertina" sigur varaborgarstjórin ósatt.

Bogi Andreasen sigur, at eg sum formaður í mentamálanevndini havi verið væl og virðiliga kunnaður um allar ætlanir um broytingar í ólavsøkukonsertini. Tað er ikki sannleikin um ólavsøkukonsertina.

Sum formaður í mentamálanevndini havi eg ikki verið tikin upp á ráð í hesum málinum, hvørki av politisku leiðsluni ella umsitingini, og tessvegna eigi eg ongan lut í málinum.

Tað framgongur eisini av eini grein í Dimmalætting, sum hevur fingið innlit í ymisk skjøl hjá kommununi, at tað var á fundi, sum borgarstjórin og varaborgarstjórin vóru á saman við embætisfólkum, at avrátt varð, at Futt ikki skuldi skipa fyri Ólavsøkukonsertini í ár. Sama seinnapart vórðu tvey embætisfólk send at bera Futt boðini.

Tað einasta, eg havi fingið at vita um hetta mál, var, tá somu menn søgdu frá ætlanunum í eini brádligari kunning á einum samgongufundi í vár. Tá gjørdi eg beinanvegin vart við, at eg helt ikki, at kommunan skuldi átaka sær ólavsøkukonsertina, men at hon skuldi útlisiterast.

Sjónarmiðið byggir á framkomnar grundreglur í mentamálum. Í málum, sum hava við list at gera, er Tórshavnar býráð farið inn á prinsippið um armslongdarfrástøðu. Tað merkir, at víst kunna politikarar játta pengar til list, men innihaldi og sniði skula teir halda seg langt frá, sjá eitt nú reglurnar um listprýði á nýggjum kommunalum stovnum.

Ongin hevur boðað formanninum í mentamálanevndini ella mentamálanevndini frá, at tað hava verið peningaligir trupulleikar av Ólavsøkukonsertini. Ongin hevur heldur skotið upp fyri nevndini at játta pening til at rinda hall av hesi konsert.

Hugsi, at vanlig mannahugsan er, at mentamálanevndin er langt inni í málum, sum hava við mentanar- og ítróttarhátíðina ólavsøkuna at gera. Tað er jú hennara málsøki. Og hetta átti helst eisini at verið vanlig mannagond. Men einki mál av hesum slag er lagt fyri mentamálanevndina. Av hvørjum kontum útreiðslurnar av hesum fara, er mær tí heldur ikki fullgreitt.

Til tess at útvega mentamálanevndini neyðugu upplýsingarnar, fari eg við hesum at biðja um innlit í allar kontur, sum hava við ólavsøkuhaldið at gera - bæði hjá kommununi sjálvari og stovnum undir henni.

### *Sum formaður í mentamálanevndini havi eg ikki verið tikin upp á ráð í hesum málinum*



Kári P. Højgaard
*løgtingsmaður fyri Sjálvstýrisflokkin*

## Viðmerking til løgmann

*Hví smílist løgmaður og sigur at ongin álvari er í tankanum um lønarlækking hjá Kára P. Højgaard, løgtingsmanni?*

Løgmaður hevur fleiri ferðir fráboðað, at hann er opin fyri øllum hugskotum sum viðføra sparingar. Mítt uppskot gongur út uppá, at løgtingið og landsstýrið sum signalvirði av sínum eintingum fara eini 5% niður í løn sum fyrimynd, ikki lønarstøðg, sum løgmaður ætlaði fyri allan arbeiðsmarknaðin. Slík lækking kann verða galdandi fyribils, til hallið á fíggjarlógini er burtur og javnvág er fingin á inntøkum og útreiðslum.

Hví vil løgmaður ikki viðgera spurningin um lønarlækking heldur enn uppsagnir?

Er tað ikki leiðin, flogskipararnir hjá Atlantsflog og starvsfólkið á Dimmalætting hava valt at gingið, fyri at sleppa undan uppsøgnum. Ment hevur verið frammi, at Miðlahúsið eisini hevur arbeitt við líknandi ætlan.

Hví tekur løgmaður ikki spurningin upp um dupulta almenna løn í 6 mánaðar, tá landstýrisfólk fara frá? Uppskotið hevur Sjálvstýrisflokkurin lagt fram meir enn einaferð, men undirtøka var ikk fyri uppskotinum.

Nú peningatrot er, verður alneyðugt at raðfesta íløgur og rakstur í tað sum er alneyðugt, neyðugt og ynskiligt.

Spurningurin er sjálvsagt eisini, um nakar álvari yvirhøvur er í metingum løgmans, at 23 tinglimir eru tað optimala, ella er bert talan um eina rakett ella ballón fyri at vinnað veljaratekki.

Føroyar hava 48760 íbúgvar og 33 tinglimir. Til samanlíkningar kann nevnast, at Áland við 26500 íbúgvum hevur 30 tinglimir og Grønland við 56000 íbúgvum hevur 31 landstingslimir.

Í staðin fyri at fara eftir bóltininum, sum »fair play« bleiv spældur á vøllin, fer løgmaður sum tann royndasti fótbóltsleikarin í politisku skipanini í eina beinleiðis »reytt kort takling« móti KPH, og roynir við ósannindum at sáa iva um trúvirði í útsøgnunum hjá sjálvstýrisformanninum. Sambært nevndu grein arbeiðir KPH kki fyri lønina og hevur hjástørv og hjávinnur við síðuna av løgtingsarbeiðinum.

*Citat: Løgmaður staðfestir, at tað eru fleiri løgtingsfólk, sum taka sítt politiska starv í fullum álvara og sum tí eru løgtingslimir burturav.- Men tað eru sanniliga eisini løgtingslimir, sum hava hjástørv av øllum handa slagi. Og í hesum sambandi heldur hann, at tinglimirnir hjá Sjálvstýrisflokkinum halda seg sanniliga ikki aftur, tí báðir hava hjástørv og hjávinnur, sum teir røkja afturat sínum løgtingssessi. –Tað fyrsta , vit kunnu vænta av løgtingslimum er, at teir eru til arbeiðis fyri sína løn osv...*

Treyðugt so, eg vildi ynskt, at avrikini í Løgtinginum vórðu sjónskari og at Sjálvstýrisflokkurin taldi fleiri tinglimir og varð roknaður millum teir stóru. Ivaleyst kundi mítt arbeiðið verið betur úr hondum greitt, tað sleppur veljarin uttan iva skjótt at meta um, men eitt er vist, eg brúki sera, sera, sera nógva tíð til politiska arbeiðið.

Síðan eg kom inn sum inn eykamaður í februar 2001, minnist eg meg ikki hava forsømt meir enn tveir arbeiðsdagar í løgtinginum. Undantikið er sjálvsagt teir dagar, eg havi umboðað løgtingið í Útnorðurráðnum og Norðurlandaráðnum, ein kann av góðum grundum ikki likamliga verða hjástaddur fleiri staðir í senn.

Rokni við at løgmaður sipar til útróðurin sum mína hjávinnu. Eg havi ein bát við b-fiskiloyvi, og tá eg havi frílotur, verður stundum farið á flot. Onki er so avstressandi fyri ein politikkara, sum at standa og egna nakrar stampar og droyma um gylta veiðu, hóast dreymurin sjálvdan verður til veruleika. Tá ein er á floti og sær hvussu náttúran háttar sær, fæst samstundis ein praktisk vitan um heimaútróður, har møguleiki er at eygleiða og gera sær sínar metingar, hvussu lítið til er av svartfugli og hvussu svangur hin fuglurin er grundað á væntandi føði. Sjálvsagt verður fiskurin, sum livir av hesi somu føði eisini ávirkaður.

Sum limur í Vinnunevndini vil eg siga, at tað er ein góð barlast at hava, nú talið av fiskidøgum verður ásett í august. Við at vitja inn í egningarskúrarnar, fæst ein greið mynd av trupuleikunum, sum fiskimaðurin hevur at dragast við. Ivaleyst veit løgmaður frá egnum royndum, hvussu trupult tað er at vinna pening í fiskivinnuni, mín part/frítíðarvinna er onki undantak í so máta.

Havi sent skattauppgerð mína til Sosialin og kann blaðmaðurin sostatt vátta, at inntøkan fyri árið 2009 einans kemur frá Føroya Gjaldstovu. Eg havi bert eitt lønt starv, løgtingsarbeiðið, tí er tað sum løgmaður førir fram í Sosialinum 16. juli ikki samsvarandi veruleikanum. Havi roynt eftir førimuni at røkt tey størv, mær eru litin til, so gott eg nú einaferð kann. Tí harmar tað meg almikið og nívir ógvuliga fast, at liggja undir ákæruni frá løgmanni um, at eg ikki taki mítt starv sum løgtingsmaður í fullum álvara.

*Kári P. Højgaard hevur sent eina skattauppgerð til Sosialin. Hon vísur, at í 2009 var øll hansara a-inntøka goldin av Føroya Gjaldstovu, red.*

### *Hví tekur løgmaður ikki spurningin upp um dupulta almenna løn í 6 mánaðar, tá landstýrisfólk fara frá*

### *Rokni við at løgmaður sipar til útróðurin sum mína hjávinnu*